# Arbeiðstíðarreglur fyri pedagogar og hjálparfólk á landsins stovnum 1. mars 2008 Galdandi frá 1. mars 2008

**Avtala millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið**

## Inngangur

Avtalupartarnir eru samdir um, at á teimum ymisku arbeiðsplássunum eiga at vera yvirskipaðar reglur fyri, hvussu arbeiðið verður lagt til rættis. Hugsast skal um starvsfólkið, uppgávurnar, tænastuna og arbeiðsumhvørvið. Nevnast kunnu hesi leiðorð:

- hvussu arbeiðstíðin verður løgd
- hvussu frítíðin verður løgd
- hvørjar vaktir verða brúktar
- matarsteðgurin
- vaktarbýtið
- hvussu avspákan verður planløgd, áløgd og møguliga avlýst
- hvussu tilkalling verður brúkt
- hvat gjørt verður við frídagar og halgidagar
- avloysarar og parttíðarsett
- avloysarar undir sjúku, barnferð og líknandi
- Út yvir avtaluna skulu havast í huga galdandi lógir, eitt nú løgtingslóg nummar 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi.

**Kapittul 1 Avtaluøki**

§ 1 Øki

Avtalan er galdandi fyri starvsfólk fevnd av avtalunum millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Stk. 2. Avtalan fevnir ikki um starvsfólk sett í fólkaskúlanum, ei heldur pedagogar í vanligum skrivstovustørvum og líknandi.

Stk. 3. Starvsfólk, sum sjálvi leggja sína arbeiðstíð, eru ikki fevnd av §§ 2-7 og § 12. Tó fáa leiðarar, sum eru við í arbeiðsætlanini, gjøld eftir reglunum.

**Kapittul 2 At leggja arbeiðið til rættis**

§ 2 Sløg av tænastum

Arbeiðið kann verða lagt til rættis sum:

a) Normaltænasta, t.e. vanligt arbeiði á staðnum eftir § 6

b) Tilkallivakt úr starvsfólkarúmi eftir §§ 14 og 16
c) Tilkallivakt heimanífrá eftir §§ 15 og 16

§ 3 At leggja arbeiðið til rættis

Meðal arbeiðstíðin um vikuna er 40 tímar.

Stk. 2. Til starvsfólk, ið hava skiftandi arbeiðstíðir, skal gerast arbeiðsætlan, sum fevnir um eitt ávíst tíðarskeið, við áseting um, nær arbeiðið skal gerast, og nær frídagarnir liggja. Arbeiðstíðin í miðal uppgjørd yvir eitt tilíkt tíðarskeið skal vera 40 tímar um vikuna. Starvsfólk eiga 4 vikur fram at vita, nær tey skulu arbeiða, og nær tey hava frí. Hetta er tó ikki galdandi fyri avloysarar og tímalønt.

Stk. 3. Broytingar í arbeiðsætlanini kunnu henda eftir samráðing við starvsfólkið.

Stk. 4. Verður neyðugt at broyta vanligu arbeiðstíðina (tímalønt undantikin) í mun til ta upprunaligu, skal fráboðast við minst 72 tíma freist, helst í arbeiðstíðini. Verður freistin ikki hildin, verður veitt viðbót fyri umlagdar tímar, ásett í felags avtalu um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð. Broytt arbeiðstíð er at skilja sum tíð, ið fellur uttan fyri ásettu arbeiðstíðina, men er ikki at roknað sum yvirtíð. Fyri broytta tilkallivakt helvtargjald av gjaldi fyri umlagdar tímar (um tíman).

Stk. 5. Tilkallivakt úr starvsfólkarúmi verður roknað sum hvíldartíð, og verður roknað sum hildin, tá ið tann samlaða hvíldartíðin í tænastuni hevur verið 11 tímar. Hvíldartíðin kann minkast niður í 8 tímar í samband við tilkallivakt, í meðal eina ferð um vikuna. Er hvíldartíðin ikki hildin, verður hon, ella partar av henni, útsett til næsta samdøgur.

Tilkallivakt úr starvsfólkarúmi telur ¾ av tíðini, hendan varir.

Tilkallivakt við virknum tilkalli telur 4/4.

§ 4 Sundurbýtt tænasta

Tænasta eigur at vera løgd soleiðis til rættis, at sloppið verður undan sundurbýttari tænastu – t.e. tænasta, sum er skild sundur av steðgi í ein tíma ella meiri.

§ 5 Avspákan

Avspákan skal verða fráboðað í minsta lagi 72 tímar undan avspákanini.

Verður avspákan tikin aftur við styttri freist enn 72 tímar, soleiðis at starvsfólkið skal arbeiða, minka avspákanartímarnir, sum um avspakað varð, og álagda tænastan verður roknað sum yvirtíð.

Stk. 3. Avspákan, sambært § 8 og § 9 skal vera avgreidd áðrenn endan av triðja heila mánaðinum, eftir at tænastan er framd, samanber tó stk. 4. Annars fellur veitingin til gjaldingar. Miðað verður ímóti, at avspákað verður í heilum døgum.

Stk. 4. Í staðbundnari avtalu kann semja verða gjørd um, at avspákan fer fram seinni ella at goldið verður fyrr enn ta ásettu tíðina í stk. 3.

§ 6 Daglig arbeiðstíð

Tann dagliga normaltænastan hjá fulltíðarsettum kann vera millum 5 og 10 tímar, samanber tó stk. 2 og 3.

Stk. 2. Normaltænasta kann vera minni enn 5 tímar í samband við frídag og aðra frítíð.

Stk. 3. Staðbundin avtala kann verða gjørd um, at dagliga arbeiðstíðin kann verða minkað niður í 2 tímar. (Fundir og tílíkt)

§ 7 Matarsteðgur

Er mattíðin fastløgd, verður hon ikki roknað við í arbeiðstíðina.

Er ikki møguleiki at fastleggja mattíðina, verður hon roknað sum arbeiðstíð, og skal haldast, tá ið arbeiðsgongdin loyvir tí.

Henda fríløtan kann vera upp til ½ tíma, og skal starvsfólkið vera til taks, um brúk er fyri tí.

**Kapittul 3 Viðbøtur fyri at arbeiða serstakar tíðir**

§ 8 Kvøld- og náttartænasta

Fyri hvørjar 40 tímar normaltænastu í kvøld- og náttarvakt eigur starvsfólkið frí í 3 tímar. Kvøld- og náttartænasta er tænasta, sum er í tíðarskeiðinum 17.00 til 06.00. Tænasta, sum verður byrjað í tíðarskeiðinum 14.00 til 17.00, har minst helvtin er aftaná kl. 17.00, skal roknast við.

Stk. 2.Vunnin frítíð eftir stk. 1 verður vanliga roknað í fullum arbeiðsfríum døgum (dagar ið annars áttu at verið arbeiðsdagar). Sí § 5

Stk. 3. Vunnin frítíð eftir stk. 1 kann eisini verða løgd inn í arbeiðsætlanina.

§ 9 Sunnu- og halgidagsarbeiði

Arbeiði sunnu- og halgidagar verður samsýnt við hálvum tíma eyka hvønn arbeiðstíma.

§ 10 Leygardags- og mánadagsarbeiði

Arbeiði leygardagar í tíðarskeiðnum millum kl. 12.00 og 24.00 og mánadagar millum kl. 00 og kl. 06, gevur viðbót eftir felags avtalu um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð, roknað í byrjaðum hálvum tímum.

Stk. 2. Viðbótin eftir stk. 1 verður ikki latin, um viðbót verður latin eftir § 9.

§ 11 Tænasta millum kl. 17 og 06

Arbeiði í tíðarskeiðnum frá kl. 17.00 til kl. 23.00, gevur viðbót eftir felags avtaluni um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð.

Arbeiði í tíðarskeiðnum frá kl. 23.00 til kl. 06.00, gevur viðbót eftir felags avtaluni um gjøld fyri ólagaliga arbeiðstíð.

**Kapittul 4 Yvirarbeiði og meirarbeiði**

§ 12 Yvirtíð

Yvirarbeiði eigur helst ikki at vera.

Stk. 2. Tænasta út yvir tilrættisløgdu dagligu arbeiðstíðina hjá fulltíðarsettum verður roknað sum yvirtíð.

Stk. 3. Starvsfólk, ið verða sett til at arbeiða yvir, eiga at fáa boð dagin fyri helst í arbeiðstíðini.

Stk. 4. Yvirtíð verður gjørd upp í byrjaðum hálvum tímum og verður avspákað, 1,5 tíma fyri hvønn tíma.

Stk. 5. Tá ið talan er um:

- sunnu- og halgidagsarbeiði eftir § 9,

- leygardags- og mánadagsarbeiði eftir § 10 stk. 1,
- arbeiði millum 17 og 06 eftir § 11

verður viðbót eisini latin fyri yvirtíðina.

§ 13 Meirarbeiði hjá parttíðarsettum

Meirarbeiði hjá parttíðarsettum verður avspákað tíma fyri tíma.

Meirarbeiði verður gjørt upp í byrjaðum hálvum tímum.

Arbeiði hjá parttíðarsettum, sum fer út um 40 tímar um vikuna er yvirarbeiði. Tó ikki vaktir eftir §14 stk. 3.

Stk. 2. Parttíðarsett, ið arbeiða meirarbeiði, skulu hava boð í seinasta lagi dagin fyri.

Stk. 3. Arbeiða parttíðarsett støðugt meirarbeiði longur enn 3 mánaðir, verður setanarbrotið broytt.

**Kapittul 5 Tilkallivakt**

§ 14 Tilkallivakt úr starvsfólkarúmi

Á stovnum, har tað er neyðugt, hava starvsfólk tilkallivakt úr starvsfólkarúmi.

Tilkallivaktin kann bæði vera frammanundan og eftir normaltænastu. Eisini kann starvsfólk møta til arbeiðis bara til tilkallivakt.

Stk. 2. Tilkallivakt úr starvsfólkarúmi verður roknað í arbeiðstíðina, ein tími svarar til ¾ tíma.

Stk. 3. Staðbundið kann verða avtalað skipan, har starvsfólkið arbeiðir vanliga vakt og hevur tilkallivakt úr starvsfólkarúmi í tilsamans 24 tímar, tó ikki meiri enn 2 ferðir um vikuna.

§ 15 Tilkallivakt heimanífrá

Starvsfólk kann hava tilkallivakt heimanífrá.

Stk. 2. Tilkallivakt heimanífrá verður roknað í arbeiðstíðina, ein tími svarar til 1/3 tíma.

§ 16 Tilkall til virkna tænastu

Starvsfólk í tilkallivakt hevur skyldu at møta beinanvegin aftaná tilkall.

Stk. 2. Úr starvsfólkarúmi: Verður starvsfólkið kallað til virkna tænastu, telja tímarnir sum normalir arbeiðstímar. (6 tímar verður til 8 tímar)

Stk. 3. Heimanífrá: Tilkall til virkna tænastu verður gjørt upp í byrjaðum tímum. Eru fleiri tilkall í sama tíma, verður tó bara samsýnt fyri ein tíma.

Tann umroknaða tilkallitíðin verður avspákað við einari viðbót á 50 %, soleiðis, at tað verður ein minking av teirri tíðini, sum frammanundan er íroknað, t.v.s. 1/3 pr. tíma í tilkallivakt. Við virknari tænastu verður 1/3 roknað sum heilir tímar.

Stk. 4. Ásetingarnar í § 9, § 10 stk. 1 og § 11 er eisini galdandi tilkallitímarnar.

§ 17 Eyka tilkallivakt

Hava starvsfólk eyka tilkallivakt, verður hetta umroknað til normal tænastu, sum verður avspákað við einari viðbót á 50%.

Stk. 2. Í sambandi við tilkall til eyka tilkallivakt, verður reduktiónin hækkað, sambært § 16 stk. 2 við 50%.

Stk. 3. Hetta er tó ikki galdandi fyri parttíðarsett og tímalønt.

**Kapittul 6 Frítíð**

§ 18 At leggja frítíðina til rættis

Starvsfólk, undantikið avloysarar og tímalønt, skula í minsta lagi 4 vikur fram vita, nær frídagarnir eru.

§ 19 Frítíðarskeið

Starvsfólk hava rætt til eitt frítíðarskeið um vikuna. Frítíðarskeiðið skal vera minst 64 tímar út í eitt. Tó verður tað roknað sum givið frítíðarskeið, er tað millum 55 og 64 tímar.

Stk. 2. Er frítíðarskeiðið ikki sum tilskilað í stk. 1, kann tað verða býtt í tvey styttri frítíðarskeið à 40 tímar. Tó verða tey roknað sum givin frítíðarskeið, eru tey millum 35 og 40 tímar.

Stk. 3. Verða 2 ella fleiri frítíðarskeið eftir stk. 1 løgd saman, skal tað fyrsta lúka treytirnar í stk. 1. Hini skulu vera 48 tímar.

Stk. 4. Verður eitt frítíðarskeið sum nevnt í stk. 1 samanlagt við eitt frítíðarskeið eftir stk. 2, skal tað fyrsta

frítíðarskeiðið lúka krøvini í stk. 1. Hini frítíðarskeiðini skulu vera 24 tímar. Verða 2 ella fleiri frítíðarskeið eftir stk. 2 samanløgd, skulu tey fyrstu tilsamans vera til longdar sum nevnt í stk. 1. Hini skulu vera 24 tímar.

Stk. 5. Verður fritíðarskeið tikið aftur við styttri fráboðan enn 4 vikur, verður samsýning givin sum yvirtíð/mist frítíð í minsta lagi 6 tímar.

Stk. 6. Í skrivligari staðbundnari avtalu kunnu seravtalur verða gjørdar um, at arbeitt kann verða upp til 12 samdøgur millum frítíðarskeiðini.

§ 20 Serstakir frídagar og halgidagar, sum fella ikki á sunnudag

Serstakar frídagar og halgidagar, sum fella ikki á sunnudag hava starvsfólk rætt til frí ella tey hava rætt til aðra frítíð. Arbeiði slíkan dag verður roknað sum sunnudagsarbeiði.

Stk. 2. Onnur frítíð verður givin, tá ið starvsfólk eru til arbeiðis slíkan dag, og onnur frítíð verður givin, tá ið starvsfólk slíkan dag hava frítíðarskeið eftir § 19.

Hetta er tó ikki galdandi um dagurin fellur á vikufrídag, tá ið starvsfólkið altíð hevur frí.

Hetta er ei heldur galdandi parttíðarsettum, har avtala er gjørd um føst arbeiðsskeið, og tá ið skeivur halgidagur fellur á tann fasta ásetta vikufrídagin í tí arbeiðsfríu vikuni.

**Kapittul 7 Arbeiðstíð o.a. hjá tímaløntum**

§ 21 Arbeiðstíð o.a.

Hesar ásetingar í avtaluni eru eisini galdandi fyri tímalønt starvsfólk:

§ 2 Sløg av tænastu

§ 4 Sundurbýtt tænasta

§ 6 Daglig arbeiðstíð

§ 7 Steðgur

§ 9 Sunnu- og halgidagstænasta

§ 10 Leygardags-/mánadagsarbeiði

§ 11 Tænasta millum kl. 17 - 06

§§ 14 – 16 Tilkallivakt

§ 22 Frítíðarskeið

Tímalønt hava rætt og skyldu til eitt frítíðarskeið fyri eitt tíðarskeið á 7 dagar.

Tó kann frítíðarskeiðið í serstøkum førum verða útsett orsakað av tænastuni, t.d. undir kvøld- og náttartænastu.

§ 23 Avlýsing av avtalaðari tænastu

Skal tímalønt starvsfólk kortini ikki gera avtalað arbeiðið ella annað arbeiði, hevur starvsfólkið – er ikki boðað frá 4 tímar áðrenn tænastan skuldi verið byrjað – rætt til løn fyri teir avtalaðu tímarnar.

**Kapittul 8 Um viðbøtur fyri summarlegur og frítíðarlegur**

§ 24

Hjá starvsfólki er tað at vera við á summar- og frítíðarlegum ein liður í tænastuni.

Stk. 2. Samsýning fyri summar- og frítíðarlegur er eftir § 12 í sáttmálanum.

Stk. 3. Ferð, uppihald og matur verður goldið.

Stk. 4. Umframt tí í stk. 2 nevndu samsýning, verður veitt endurgjald fyri mistar frídagar sambært galdandi reglum, tó soleiðis, at miðað verður ímóti, at hetta verður givið sum frítíð.

Stk. 5. Aðrar reglur um arbeiðstíð verða settar úr gildi.

Stk. 6. Starvsfólk fáa vanliga løn á summar- og frítíðarlegum, og ein dagur telur 8 tímar.

§ 25 Ígildiskoma og uppsøgn

Henda avtala er galdandi frá 1. mars 2008 og kunnu partarnir siga hana upp við 3 mánaða freist, tó í fyrsta lagi til tann 1. oktober í 2010.

Á Argjum tann 17. desember 2007

Føroya Pedagogfelag / Fíggjarmálaráðið